# Bakkafrostmálið ikki endaliga avgreitt

**– Vit fara at kanna málið einaferð aftur-at, og so fara vit at taka støðu til, um vit skulu fara víðari við hesum málinum, sigur Bárður Enni, leiðari á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum heldur tað vera sera óheppið, at politikarar taka eitt mál upp í valstríðið, sum ikki er endaliga avgreitt**



*Hóast fútin hevur reinsað Bakkafrost, er seinasta orðið ikki sagt í málinum. – Heilsufrøðiliga Starvsstovan fer aftur at hyggja at málinum og taka støðu til, um vit skulu fara víðari við tí ella lata tað liggja, sigur Bárður Enni, leiðari á Starvsstovuni*

*Mynd: Jens K. Vang*

STARVSSTOVAN

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Seinasta orðið er eftir øllum at døma ikki sagt enn í málinum um Bakkafrost. Fútin kom til ta niðurstøðu, at onki óregluligt er farið fram á Bakkafrost, men Bárður Enni, leiðari á Starvsstovuni sigur, at starvsstovan skal nú taka støðu til, hvat tað næsta stigi hjá teimum verður.

– Lat meg fyrst av øllum siga, at Starvsstovan fer ongantíð til fútan við einum slíkum máli, um ikki vit eru 100 % vís í okkara søk. Tað, at fútin er komin til aðra niðurstøðu, taka vit til eftirtektar, men vit fara at hyggja at málinum aftur og gera av, um vit skulu fara til ríkisadvokatin við tí ella bara lata tað liggja, sigur Bárður Enni, sum tó ikki vil fara í smálutir við hesum málinum.

Hann letur væl at samstarvinum millum Bakkafrost og Starvsstovuna annars og heldur verandi støðu vera sera óhepna fyri báðar partar.

### Eftirlýsir kjak

Í valstríðnum, sum herjar oyggjarnar hesa tíðina, hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan verið uppi og vent meira enn einaferð millum tey uppstillaðu.

– Politikarar blíva heitir, orð dettur av orði og so framvegis, tað kennir ein til. Men tað er sera óheppið, at tey taka eitt ávíst mál í teirra valstríð, sigur Bárður Enni.

Hann vísir á, at tað eru nógvar nýggjar ES kunngerðir komnar seinnu árini og sigur, at tað hevur havt umfatandi broytingar við sær á hesum økinum. Broytingar, sum samfelagið ikki hevur sett seg nóg væl inní. Og tískil heldur hann, at tað endar soleiðis, at tá eitt mál so kemur fram, standa fólk og politikarar spyrjandi og skilja onki.

Kjak upp og niður eru um skattin, men onki kjak er um hetta evnið og ei heldur nakar matvørupolitikkur á økinum, og tað eftirlýsir leiðarin á starvsstovuni.

– Vinnan og starvsstovan fylgja væl við hesum reglum, men tað kann tykjast sum at samfelagið ikki ger tað, sigur Bárður Enni, sum heldur at eitt kjak um nýggju ES kunngerðirnar kundi avgjørt verið við til at varpað ljós á hetta økið og samstundis verið við til at rudda nógvar misskiljingar av vegnum.

– ES reglurnar eru sera óføroyskar, og tí haldi eg, at eitt kjak, um vit eiga at halda okkum innan hesar reglurnar, sum ávirka alt okkara samfelag ella umskipa tær meira, so tær hóska betur til føroysk viðurskifti, hevði verið upp á sítt pláss, sigur Bárður Enni, sum tó leggur dent á, at tað eigur at bíða til málið um Bakkafrost endaliga er avgreitt.

# Skipaða leitingin steðgað

**Skipaða leitingin eftir Gudmundi Isfeldt er steðgað, men leiðarin á Sjóbjargingarstøðini, Djóni Weihe, sigur, at kortini verða eyguni havd eftir honum, tá fólk eru úti**

LEITING

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*




*Áttamannafarið Hella varð tikin upp týsdagin, og verður tað nú kannað av Skipaeftirlitinum. Skipaða leitingin eftir Gudmundi Isfeldt er nú steðgað*

*Mynd: Jens K. Vang*

– Sum so er ongin skipað leiting eftir Gudmundi Isfeldt nú, men vit fara aftur um aftur og hyggja á rekaplássum, sigur leiðarin á Sjóbjargingarstøðini. Áttamannfarið Hella varð funnin sunnudagin og fingin upp týsdagin. Báturin verður nú kannaður av Skipaeftirlitinum, men Gudmund Isfeldt er ikki aftur í aftur komin.

Leiðarin á Sjóbjargingarstøðini heldur tað vera lítið sannlíkt, at Gudmund skal vera farin í gummibátin, tí har er ymisk neyðútgerð, sum hann so kundi gjørt nýtslu av.

– Vit hava leitað vítt. Tað kvøldið bleiv millum annað leitað fram við landi á Eysturoynni og dagin eftir varð leitað á einum veldugum øki eystanfyri við flúgvara, greiðir Djóni Weihe frá.

Nú er ein vika síðani, at Gudmund Isfeldt ongantíð kom vegin fram til Havnar á veg úr Nólsoynni við áttamannafarinum Hellu, og tann skipaða leitingin er steðgað.

# Syðraberg siglt á land

**Mánakvøldið um hálvgum sjey tíðina sigldi Syðraberg á Sandsboðar**

ÓHAPP

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Klokkan 18.33 mánakvøldið tann 13.januar 2004 fekk sjóbjargingarstøðin boð frá Tórshavn Radio, at Syðraberg hevði siglt á Sandsboðar.

Við Syðraberg var 1 maður og eydnaðist tað honum at senda út neyðarkall.

Somuleiðis eydnaðist tað manninum at sleppa upp á eina hellu, og um sjeytíðina fingu fólk frá landi við línu bjargað manninum av skerinum og á land.

# Fá geva sálarumhvørvinum gætur

**Sálarliga arbeiðsumhvørvið hjá limum í Havnar Arbeiðskvinnufelag verður í løtuni kannað, men áhugin at svara tykist lítil**

ARBEIÐSUMHVØRVI

*Tíðindaskriv*

Havnar Arbeiðskvinnufelag og Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu í Sjúkrahúsverkinum eru farin undir eina kanning av, hvussu limir felagsins hava tað á arbeiðsplássunum við serligum atliti til sálarliga arbeiðsumhvørvið. Fyri at kunna samanbera úrslitini við onnur, verður brúkt eitt spurnarblað, sum danska Arbeiðsmiljøinstituttið hevur gjørt og nýtt á nógvum arbeiðsplássum.

Spurt verður um heilsustøðuna og um trivnaðin. Spurt verður eisini um krøv, ávirkan og møguleikar í arbeiðinum

Havnar Arbeiðskvinnufelag sendi fyrst í desembur 811 spurnarbløð út til limirnar. Svaraðu spurnarbløðini skuldu navnleys sendast Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu til viðgerðar.

Higartil hava umleið 250 svarað. Hetta er ov fá til at kanningin kann gerast eftirfarandi, men møguleiki er enn at senda inn allan januar mánaða.



# Sambandsflokkurin lýsir á fartelefonini

**Sambandsflokkurin er farin at nýta alternativar metodur í valstríðnum. Hvørja ferð tú fært eitt sms frá heimasíðuni hjá Føroya Tele verður tú mintur á, at "Sambandsflokkurin er cool"**

VALSTRÍÐ

*Stefan í Skorini*




*Sambandsflokkurin er farin at nýta sms í valstríðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Mangt er í neyðini nýtt verður sagt. Ikki tí at Sambandsflokkurin er í neyð í hesum døgum, um vit skulu trúgva tí nýggjastu veljarakanningini, men flokkurin er farin at nýta ógvuliga alternativar metodur í valstríðnum.

Sambandsflokkurin hevur nevnliga keypt sær rættindini til lýsingarnar á sms-unum, sum verða send frá heimasíðuni frá Føroya Tele. Hesi munnu telja fleiri hundrað ella kanska túsund hvønn dag, og tí kemur hesin boðskapurin víða um.

Tað er kanska serliga ungdómurin, sum hvønn dag fær boð um, hvussu cool Sambandsflokkurin veruliga er. Tað eru nevniliga nógv ung, sum hvønn dag nýta heimasíðuna www.olivant.fo at senda sms til vinir og kenningar.

Sambandsflokkurin hevur mangan verið ákærdur fyri at vera ein afturhaldssinnaður flokkur, men í hesum førinum tykist hann at ganga á odda í nýskapandi valstríði.

## Fram til valið verða kjakfundir hildnir hvønn dag á serligu café'ini hjá Javnaðarflokkinum

VALCAFÉ

*Tíðindaskriv*

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag skipar fyri café og spennandi kjakfundum hvønn dag. Javnaðarcafé'-in er opin hvønn dag frá kl. 14 – 18. Valevnini hjá Javnaðarflokkinum eru at hitta. Um kvøldarnar eru spennandi kjakfundir á skránni í Bládýpinum.

**Mikukvøldið 14. januar, kl. 20**
**Helena Dam á Neystabø – Tjóðskaparlig semja í sjálvstýrismálinum.**
Helena Dam á Neystabø fer at tosa um uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um eina tjóðskaparliga semju í sjálvsstýrismálinum. Helena fer eisini at hugleiða um møguleikarnar fyri at fáa eina breiða politiska semju í føroyskum politikki um hetta mál, tí hetta hevur ikki eydnast higartil.

**Hóskvøldið 15. januar, kl. 20**
**Jan Poulsen – Yvirtaka løgregluna – og hvat so?**
Jan Poulsen er, umframt at verða løgreglumaður, kendur frá ferðslusendingini í Útvarpinum "Ring til løgregluna". Jan fer at leggja upp til eitt kjak um avleiðingarnar av at yvirtaka løgregluna. Jan fer at tosa um rættartrygdina eftir eina møguliga yvirtøku av løgregluni, hvør tann veruligi kostnaðurin er av at yvirtaka løgregluna, arbeiðsumstøðurnar hjá løgregluni, herundir útbúgving og førleikamenning og um løgregluna í tí altjóða samfelagnum.

**Fríggjakvøldið 16. januar, kl. 20**
**Joan Ziskason – Økispsykiatri**
Joan Ziskason er sjúkraróktarfrøðingur. Eitt av hjartamálunum hjá henni er at skipa soleiðis fyri, at tey sinnisveiku í Føroyum fáa eitt virðiligt lív. Joan fer at tosa um umstøðurnar hjá teimum sinnisveiku, og um hvussu hesar umstøður kunnu betrast, við millum annað eini stuðulsfólkaskipan. Sofus Joensen, yvirlækni á psykiatrisku deild, og onnur luttaka.

**Leygarkvøldið 17. januar, kl. 20**
**Elin Lindenskov – Tjóðpallur Føroya**
Elin Lindenskov leggur upp til eitt kjak um Tjóðpall Føroya og um umstøður hjá mentanini í Føroyum. Vit eiga nógv og sera dugnalig listafólk í Føroyum, og fleiri av teimum finnast eisini í fremstu røð innan teirra økið uttanlands. Avbjóðingin er at skapa Tjóðpalli Føroyar so góðar karmar, so Tjóðpallurin kann gerast lokomotivið innan føroyska list – eins og Norðurlandahúsið.

Øll eru vælkomin til eitt spennandi kjak.

Javnaðarcafé'in heldur til í hølinum í Bládýpinum, beint við Keypsamtøkuna í Dr. Jacobsensgøtu.

# MBF veitt Fornminnissavninum viðurkenning

**– Vit halda, at Forminnissavnið hevur víst sektorábyrgd við sjálvt at útvega sær pening til ábøtur. Í nógvum førum vilja stovnar, feløg og arbeiðspláss fegin betra um - bara onkur annar rindar**

VIÐURKENNING

*Anna Joensen,*
*praktiknæmingur*



*– MBF fegnast um tann hugburð og sektorábyrgd, sum Forminnissavnið vísir og vónar, at stovnurin verður brúktur sum fyrimynd fyri onnur líknandi søvn, sigur Marjun Sigurðsdóttir, formaður í MBF*

Á altjóðadegi teirra brekaðu, 3. desember 2002, lýsti landsstýrismaðurin í almannamálum ár 2003 at vera ár teirra brekaðu, eins og gjørt varð í meginpartinum í Evropa.

Í desember farna ári – 2003 - varð hesin dagurin eisini »markeraður«; tá skipaði Almannamálaráðið fyri fundi, har ymiskir partar í samfelagnum vóru møttir at tosa um møguleikarnar hjá teimum vinnutarnaðu á arbeiðsmarknaðinum.

Á fundinum í ár segði formaðurin í MBF, Marjun Sigurðsdóttir, at í altjóða høpi Sameindu Tjóð verður arbeitt við at endurskoða fyrimyndarreglurnar.

– Ætlanin er at gera reglurnar bindandi fyri tey lond, ið skriva undir - í staðin fyri sum nú, at tær hvíla á hin góða viljan.

Hon segði, at nøkur av loysunarorðunum hava verið: 1) Atkoma í breiðastu merking, 2) Líkarætt til upplýsing og kunning og 3) Sektorábyrgd.

Á altjóða degi teirra brekaðu gav MBF Fornminnisfelagnum viðurkenning fyri at uppfylla hesar tríggjar treytirnar.

Marjun vísti á, at sektorábyrgd merkir, at øll øki eiga at taka á seg ábyrgd av, at allir borgarar landsins kunnu gera nytslu av teirra tænastu, ið stovnurin stendur fyri.

– Tað er líka mikið, um tað eru vegir, samferðsla, skúlar ella sum í hesum føri, søvn.

Hon segði, at í norðurlenskum høpi hevur nógv verið gjørt burturúr setninginum, »Museer før alla I Norden«, og út er komin bók um 12 søvn í norðurlondum.

– Næstu ferð kunnu vit kanska vera við, nú bæði Listaskálin og Fornminnissavnið eru atkomandi. Vit halda, at Forminnissavnið hevur víst sektorábyrgd við sjálvt at útvega sær pening til ábøturnar. Í nógvum førum vilja stovnar, feløg og arbeiðspláss fegin betra um - bara onkur annar rindar.

Marjun segði, at starvsnevnd MBF's fekk fýra uppskot til viðurkenning og fegnast hon um, at eisini privatfólk gera nakað við hesi viðurskifti.

– Vit hava gjørt av, at geva Fornminnissavninum viðurkenningina fyri 2003 við teirri grundgeving, at Forminnissavnið er eitt týðandi og áhugavert savn við framsýningum, ið avgjørt hava áhuga fyri flest allar føroyingar - eisini føroyingar, ið bera brek.

MBF metir, at atkoman heilt frá túninum og runt um inni á savninum er sera góð. Gott pláss er til koyristólar, og wc er sera gott og rúmligt. Frágreiðingar og annað um lutirnar, ið vera sýndir fram, eru í góðari hædd, og lætt er at lesa, tá ið tú situr niðri.

- Lyfta er nú sett upp, ið bindir hæddirnar saman, so fólk við breki kunnu koma runt um alla framsýningina á jøvnum føti við onnur. Savnið hevur av síni játtan raðfest eina lyftu, ið vit vilja geva teimum eitt herðaklapp fyri.

Marjun Sigurðsdóttir segði, at MBF fegnast um tann hugburð og sektorábyrgd, sum Forminnissavnið vísir og vónar, at stovnurin verður brúktur sum fyrimynd fyri onnur líknandi søvn.